## Kann seta 22 segl

Statsraad Lehmkuhl er 1.516 bruttotons. Tað hevur 22 segl, og samlaða víddin á teimum er 2000 fermetrar. Hetta svarar til 45 metur i fýrakant. Skipið hevur tó eisini ein 1.125 hk dieselmotor og kann í hampiligum líkindum ganga 11 míl. Longdin er 98 metrar omanfyri vatnlinjuna, breiddin er 13 metur. Hædd er 48 metrar upp í hægstu mastrina, og dýpið undir vatnlinjuni er 5 metur.



# Á ferð við nors

**Í farnu viku var norska skúlaskipið Statsraad Lehmkuhl í Føroyum. Tað var ikki opið fyri almenninginum, men kortini sluppu vit umborð og kunnu greiða eitt sindur frá lívinum umborð á einum slíkum skipi**



## Skip



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Orsøkin til, at vit sluppu umborð, var tann, at vit vóru í fylgi við Gunnhild Dahl Niclasen, sum hevur verið manning umborð fyrr í summar. Hon er ættað úr Havn og Klaksvík, dóttir Onnu Thomsen og Andrass Dahl Niclasen.

Gunnhild hevði hug at fara umborð at heilsa upp á manningina, sum hon kendi frá hesi ferðini. Hetta var tó ikki bara sum at siga tað. Molin er jú stongdur fyri óviðkomandi. Tí mátti fáast serloyvi frá havnaskrivstovuni at sleppa út á molan, har skipið lá. At sleppa umborð var eingin trupulleiki, tá ið manningin sá, hvør ið gesturin var.

Annars er 24 ára gamla Gunnhild garvaður "sjómaður" og hevur roynt meira á sjónum enn flestu javnaldrar, eisini meira enn flestu dreingir.

Hon hevur verið við skúlaskipinum Danmark, og hevur hon fylgt fyridøminum hjá pápanum Andrassi, sum eisini var við her 30 ár frammanundan. Hann gjørdist sjómaður og sigldi í nøkur ár.

Gunnhild hevur verið til skips við Atlantic Navigator annan túrin, hann gjørdi í 2006. Haðani fór hon beint umborð á sjóverjuskipið Brimil, har hon var dekkari í sjey mánaðir.

Seinasta ár var hon eisini við seglbátinum Enniway hjá Hávarði Enni, sum er sonur Birgir, á ferð til Skt. Kilda, sum er ein lítil avtoftað oyggj vestan fyri Skotland. Her síggjast framvegis leivdir av gamlari búseting. Tey vóru seks fólk við bátinum og vóru burtur í 12 dagar.

### Vunnu kappsiglingina

Í summar arbeiddi Gunnhild umborð á skúlaskipinum Danmark at gera klárt til komandi ferðina hjá teimum. Tá fekk hon møguleika at sleppa við Statsraad Lehmkuhl, sum var við í eini kappsigling Tall Ships Races fyri seglskip úr allari verðini.

Kappsiglingarleiðin var úr Århus til Kotka í Finnlandi. Har var ein hópur av skipum í ymiskum støddum, og Statsraad Lehmkuhl vann kappingina bæði samanlagt og í sínum bólki.

Skipið hevur verið við í kappingum síðan 1960, men hetta er fyrstu ferð síðan 1997, at teir hava vunnið.

### Seglið 2000 fermetrar

Skipið verður annars mett at vera

sosialurin